# Sera grunnur grunnur

*Norðuri í Vík situr ein sera skuffaður maður, Ragnar nevndur, og hann kennir seg ikki væl viðfarnan. Hann sendi umsókn til nýstovnaða tónleikagrunnin hjá Norðoya Sparikassa, men illa gekk at fáa svar, hóast svar varð lovað honum í fleiri umførum. Ragnar er boðin við á tónleikafagna millum 10 lond í Póllandi, har sjónvarp sendir beinleiðis til teir 36 milliónir íbúgvarnar. Tá svar endiliga kom, var tað eitt nei, so nú ætlar Ragnar í Vík at finna aðrar stuðlar til ferðina*

DAGFINN OLSEN

Í september í fjør boðaði Norðoya Sparikassi frá, at tónleikagrunnur var settur á stovn. Ein grunnur, ið skuldi veita veruligan stuðul til tónleikarar í Føroyum. Ikki bert smærri veitingar, ið ikki gera tann stóra munin.

Eisini kom fram, at grunnurin serliga skuldi veita stuðul, so føroyskur tónleikur kann gerast kendur uttanfyri landoddarnar.

– Tað frøddi tey, sum hava áhuga fyri at, føroyskur tónleikur og føroyskir tónleikarar kundu gera seg galdandi uttanlands, tá SVF í september mánaði í fjør, bar tey tíðindi, at Norðoya Sparikassi í sambandi við 80 ára føðingardag sín, kunngjørdi fyri øllum Føroya fólki, at nú var ein tónleikagrunnur settur á stovn. Hesin grunnur skuldi vera ein verunlig hjálp til tónleikararnar í Føroyum, og serliga skuldi hann veita stuðul til at gera føroyskar tónleikarar og føroyskan tónleik kendan uttanlands. Hetta skuldi muna, í mun til tann stuðul, ið var latin til tónleikin higartil. Greitt var frá, at eitt 6 sifrað tal var í grunninum, og tað kundi væl hugsast, at øll upphæddin fór til ein persón, - og um ikki, so bleiv her ikki talan um at býta í smálutir, sum tað so ofta verður gjørt. Sjálvandi gleddist eg yvir hetta stóra stig, sum Norðoya Sparikassi hevði tikið Eg var beint tá komin aftur úr Norra, har eg hevði verið og lagt seinastu hond á mína fyrstu fløgu, sum kom út 9. oktober, greiðir Ragnar í Vík frá.

### Ikki ígjøgnum nálareygað

Ragnar í Vík søkti um stuðul úr grunninum, tí hann marknaðarførir sína fløgu við rímuligari eydnu í útlondum og hann er boðin við til ein tónleikafagna við 10 luttakandi londum í Póllandi. Sent verður beinleiðis í sjónvarpi til teir 36 milliónir íbúgvarnar.

At fáa eitt nei kann ein rokna við, tá ein søkir, men at ein einki svar fær er nakað annað. Ragnar í Vík fekk noktandi svar úr grunninum, men tá hevði hann í fleiri umførum spurt eftir svari og fingið tað lovað heilt skjótt. Men vikur gingu.

Men útfrá ætlanunum at gera føroyskan tónleik kendan í útondum, so er Ragnar heldur skuffaður.

– Sjálvur dugi eg ikki at síggja, hví eg ikki havi uppiborið, stuðul úr tónleikagrunninum hjá Norðoya Sparikassa. Tað, sum eg ikki kann góðtaka er, hví nevndin í grunninum lat meg bíða so leingi eftir svari, og sostatt oyðilegði mær møguleikan at sleppa at spæla og syngja í eini beinleiðis sjónvarpssending í einum landið, ið hevur 36 milliónir íbúgvar. Út frá mínari umsøkn visti nevndin fullvæl, at uttan stuðul frá tónleikagrunninum, var ongin møguleiki hjá mær at gera nakað sum helst við tónleikin uttanlands. Eisini haldi eg at teir í nevndini fyri tónleikagrunnin hjá Norðoya Sparikassa skylda sjónvarpshyggjarum, eins og øllum tónleikarum í Føroyum, eina frágreiðing, um hvør tað er sum kann fáa úr grunninum, tá í Ragnar í Vík ikki gongur ígjøgnum nálareygað, metir Ragnar.

### Einki svar

Ragnar í Vík søkti grunnin um stuðul, so hann kundi hava møguleikan at luttaka á tónleikafagnaðinum í Póllandi.

– Eg var tann 31. januar í Norðoya Sparikassa og handaði teimum umsókn mína. Tað bleiv sagt, at fyrsta marts ella fyrstu vikuna av mars blivu svarini útsend. Allur marsmánaði gekk, og onki svar kom frá tónleikagrunninum. Um mánaðarskiftið mars-apríl ringdi eg til Norðoya Sparikassa og spurdi eftir svari og greiddi teimum frá, at tað var sera umráandi, at teir góvu mær eitt svar, tí eg arbeiðdi við einum túri til Póllands. Teir søgdu, at hetta var ikki so einfalt og tók longri tíð, enn roknað var við. Teir lovaðu mær svar ein av teimum fyrstu døgunum. Onki svar kom. Tvær vikur gingu, uttan eg fekk nakað svar. Eg setti meg so aftur í samband við tónleikagrunnin, og segði, at tað nú var farið so langt út um ásettu tíðina fyri at svarini skuldu verða givin, og at eg var sera misnøgdur við ta viðferð, ið eg hevði fingið. Eisini spurdi eg, um nakað var galið við umsókn míni, ella um teimum tørvaði fleiri ítøkiligar upplýsingar, men so var ikki. Svarið var tað sama, tað tók bara longri tíð enn væntað. Tann 24. apríl kom so tann formella innbjóðingin úr Póllandi, og eg sendi Norðoya Sparikassa avrit av innbjóðingini, greiðir Ragnar frá.

– Eg ringdi so aftur til Tónleikagrunnin og spurdi um teir høvdu móttikið skrivið úr Póllandi. Tað váttaðu teir og søgdu, at tað var lagt inn í umsóknina, og at eg komandi viku skuldi fáa eitt svar. Nú gingu aftur tríggjar vikur uttan nakað svar. Eg setti meg aftur í samband við teir og greiddi teimum frá, at tað var alt avgerandi, at eg fekk at vita ,um eg fekk játtaðan nakran pening ella ikki, men teir blivu við at biða meg bíða. Fríggjamorgun tann 18. maj ringdi eg so norður til Norðoya Sparikassa og segði, at í dag vildi eg hava eitt svar. Teir lovaðu, at í dag skuldi eg fáa svar, og svarið kom, sigur Ragnar í Vík, sum ikki fekk stuðul frá grunninum.

Hesum er hann sjálvsagt keddur av, men ringast heldur hann viðferðina vera, sum hann hevur fingið.

– Tað, sum eg ikki kann góðtaka er, hví nevndin í grunninum lat meg bíða so leingi eftir svari, og sostatt oyðilegði mær møguleikan at sleppa at spæla og syngja í eini beinleiðis sjónvarpssending, í einum landið, ið hevur 36 milliónir íbúgvar, heldur Ragnar.

Síðani ársskiftið hevur Ragnar arbeitt við at marknaðarføra fløgu sína í útlondum og hann hevur júst latið gera 1000 nýggj eintøk av fløguni, sum eru í einum øðrvísi húsa. Hetta verður sent til útvarpsstøðir og onnur kring knøttin.

Ragnar hevur roynt seg við trimum løgum í Europa og øll eru komin á top 30 countryhitlistan. Harav kom lagið Alone and Forsaken á eitt 24. pláss og var lagið í januar millum 40 tey mest spældu countryløgini í Europa.

Ragnar hevur verið við á sonevndum Hotdiscum, sum eru fløgur við endamálinum at gera vart við løg og tónleikarar. Enn einaferð sleppur Ragnar upp í part, tá Stuart Cammeron gevur út næsta Hotdiscin í juli.



Kitty Prins, sangari og sangskrivari úr Belgia, hevur skrivað eitt lag á fløguni hjá Ragnari í Vík. Hon hevur nú skrivað Ragnari 3 nýggj løg og ætlar hann at gera eina stakfløgu við hesum løgum, um møguleiki verður fyri hesum.

### Pólland hóast alt

Ragnar í Vík er nú farin at leita eftir stuðlum til ferðina til tónleikafagnaðin í Póllandi, umframt at hann á øðrum økjum roynir at laga tað so, at ferðin kann gerast veruleiki.

Ragnar í Vík og tónleikarar fara, um gjørligt, til Póllands um ólavsøkutíð og slík ferð kostar ferðalagnum eini 70.000 krónur.

## Ikki leisturin í framtíðini

*Gunnar Nolsøe frá Tónleikagrunni Norðoya Sparikassa sigur, at teir beinanvegin gjørdu greitt, at á fyrsta sinni kundi tað henda, at viðgerðartíðin av umsóknum tók nakað av tí, men at hetta ikki er ætlaða arbeiðsgongdin og hetta verður ikki leisturin í framtíðini*

DAGFINN OLSEN

Gunnar Nolsøe frá Tónleikagrunni Norðoya Sparikassa sigur í sambandi við umsóknina hjá Ragnari í Vík, at sambært viðtøkunum hjá grunninum, so kann hann ikki gera viðmerkingar til einstakar umsóknir.

– Miðað verður eftir, og tað er lagt inn í viðtøkurnar fyri grunnin, at ein mánað eftir, at umsóknarfreistin er farin, skulu allar umsóknirnar vera avgreiddar. Játtandi ella noktandi. Hetta er ikki krav, men eitt endamál, sigur Gunnar Nolsøe.

- Men vit hava eisini sagt alla tíðina, at hetta er nýtt fyri okkum og vit roknaðu við at nýta meira tíð fyrstuferð, enn vit annars koma at gera, sigur Gunnar Nolsøe.

- Tað hava vit eisini gjørt, so vit eru farin langt framvið tíðini, sum vit hava álagt okkum sjálvum til viðgerðina. Men tað roknaðu vit við, sum sagt. Men tað verður ikki vanlig mannagongd í framtíðini. Tað er fyrstuferð, staðfestir Gunnar Nolsøe.

- Vit fingu sera nógvar umsóknir. Serliga tær síðstu tvær vikurnar, áðrenn freistin var úti. Nógvar eru væl kvalifiseraðar og tí hevur verið drúgt at viðgera tær, sigur Gunnar Nolsøe.

Hann vil ikki siga, hvørt grunnurin hevur latið játtandi svar til innkomna umsókn.

– Vit úttala okkum ikki um, hvør fær noktandi svar, ella hvussu nógv tey eru. Tað er millum okkum og umsøkjaran. Men hinvegn hava vit tryggjað okkum, at har vit játta, har vilja vit loyva okkum at kunngera tað. Hetta er sjálvsagt eisini í PR høpi. Men har koma vit eisini at fylgja tí leisti, at vit gera ikki viðmerkingar, fyrr enn ávísa ætlanin er komin so mikið langt, at hon skal almannakunngerast, sigur Gunnar Nolsøe.

Gunnar Nolsøe sigur, at grunnurin ikki bert letur til umsøkjarar í Norðoyggjum, men at býtt verður um alt landið.

– Sjávsagt eru vit lokalur stovnur, og hyggja vanliga eftir við slíkum eygum, men ikki í Tónleikagrunninum. Har hyggja vit eftir øllum landinum og hvat nevndin trýr upp, sum góða ætlan, sigur Gunnar Nolsøe.

Hann sigur, at nevndin ætlar at halda seg til at lata munandi stuðul. Ætlandi fer grunnurin við í eina ella fáar ætlanir, har stuðulin er munadyggur.

– Útfrá hesum kann eg so siga, at nógvar av umsóknunum vóru sera væl kvalifiseraðar og vit hava eisini sagt nei til umsóknir, sum vit útfrá endamálinum hjá grunninum kundu sagt ja til, sigur Gunnar Nolsøe.

Hann leggur dent á, at langa viðgerðartíðin í fyrsta umfarinum var havd á lofti beinanvegin, men hetta verður ikki leisturin í framtíðini.





*Anker Eli Petersen frammanfyri einum av sínum verkum, sum hann sýnir fram í Smiðjuni í Lítluvík í hesum døgum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Virus oyðilegði part av framsýningini

*Listamaðurin Anker Eli Petersen varð raktur av herviligu »I love you« virusinum, og hann misti ein part av konseptinum, sum hann í hesum døgum sýnir fram í Smiðjuni í Lítluvík*

EYÐUN KLAKSTEIN

Fyri nøkrum vikum síðani gjørdi eitt herviligt fríggjarabræv um seg á internetinum. Teldurbrævið, sum hevði heitið »I love you« sendi eitt telduvirus kring allan heim, og nógva staðni gjørdi virusið skaða.

Ein av teimum, sum varð raktur av hesum virusið, var føroyski listamaðurin Anker Eli Petersen, sum er búsitandi í Danmark.

– Eg fekk virusið sendandi frá einum stovni, sum eg havi gjørt ymiskt fyri, og eg helt tí, at teldubrævið snúði seg um hetta. Ikki fyrr enn tað var ov seint fann eg út av, at talan var um eitt virus, sigur Anker Eli Petersen.

Anker Eli Petersen brúkar eisini teldu í sínum arbeiði, og á telduni fór ymiskt fyri skjeyti.

– Eg hevði tíbetur backup av tí mesta, men ikki av øllum, sigur hann.

### Misti bókling

Millum tað, sum fór fyri skjeyti, var ein bóklingur, sum Anker Eli Petersen hevði gjørt til prýðislutirnar, sum hann í hesum døgum sínir fram í Smiðjuni í Lítluvík.

– Bóklingurin var ein partur av konseptinum, tí í honum stóð ein frágreiðing um, hvat tað ymiska í prýðislutunum merkir, greiðir listamaðurin frá.

Ætlanin var, at hesin bóklingur skuldi fylgja við prýðislutunum, tá fólk keyptu teir, men hesum forðaði virusið fyri. Stundir vóru ikki at gera ein nýggjan bókling áðrenn framsýngin skuldi vera.

Anker Eli Petersen hevur framsýning saman við Helga Joensen. Anker Eli sýnir fram teknigar og prýðislutir, sum 3'arin í SMS hevur evnað til úr silvuri. Helgi Joensen sýnir fram lutir, sum hann hevur gjørt úr tini. Talan er um standmyndir og vasara, umframt eitt relief.

Framsýningin er opin frá klokkan 11.00 til 20.00. Sunnudagin,tá framsýningin endar, er opið frá kl. 14.00 til 20.00

## Avmarkið ávirkanina hjá einstøkum eigara

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyri stuttari tíð síðani settu leiðslurnar í Vestlax og Pan Fish undirskritir sínar undir eina avtalu, sum innibar, at Vestlax fær ognarrættin einum rættiliga stórum parti av føroysku alivinnuni, mált eftir framleiðslu.

Hetta hevur eftir øllum at døma fingið nevndina í Føroya Havbúnaðarfelag at heita á landsstýrismannin við vinnumálum um at avmarka, hvussu stórn part av føroysku aliloyvunum kann vera í hondunum á einum og sama eigara.

Grundgevingin hjá Havbúnaðarfelagum er, at tá Føroya Landsstýri gevur eitt aliloyvi, fylgja ávísar treytir við loyvinum. Hetta kann samanlíknast við, tá fiskiloyvi ella rættindi til kvotu vera latin ávísum skipum.

Landsstýrismaðurin er ikki samdur við felagnum og heldur, at alivinnan skal sammetast við fiskiídnaðin, har Fiskavirking keypir umleið 40 prosent av samlaða tilfeinginum undan Føroyum.

Men munur er á alivinnu og fiskivinnu, skrivar Vinnuhúsið. Í fiskiídnaðinum kunnu øll, sum hava áræðið at bjóða seg fram, keypa rávøru. Í alivinnuni sleppa bara tey framat, sum frammandundan hava fingið aliloyvið.

## Fundaðust um fisk

Tann 5. fundurin millum fiskimálaráðharran í Norður Atlantshavinum varð hildin í Ilulissat í Grønlandi frá 23. til 27. mai. Fiskimálaráðharrar úr Kanada, Grønlandi, Íslandi, Føroyum og Noreg vóru við á fundinum. Úr Russlandi og ES luttóku embætisfólk á hægsta stigi.

Fiskimálaráðharrafundurin hesuferð hevði 4 høvuðsevni. Tey vóru:

1) Hvussu veiðiflotin verður umsitin á burðadyggum grundarlag, herundir minking í samlaða veiðiflotanum og stýring av ovurorku í útflutningi av skipum. Avleiðingar av ólógligum fiskiskapi og óregluligum fráboðanum.

2) Eftirlit og hondhevjing í fiskiskapi.

3) Vistskipanin í havinum og ávirkanin frá súgdjórum.

4) Umhvørvis grundreglur og tillaging í stýringini av fiskivinnuni.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum hevði eitt innlegg um vistskipanina í havinum og um ávirkanin frá havsúgdjórum. Hann nýtti høvi til eisini at bjóða Kanada og Russlandi við sum limir í NAMMCO.

# Fólkatónleikarstevna í næsta mánaði

Í døgunum frá 10. til og við 16. juli í ár verður aftur skipað fyri Fólkatónleikarastevnu. Eins og vanligt verða konsertir á bygd og í bý, og tónleikarar úr Føroyum og úr øðrum londum vera við. Útlendsku gestirnir í ár eru bólkurin »Utla« úr Noregi, bólkurin »Dandala« við 6 monnum úr Gambia og einum dana, heimskendi svenski tvørfloytuleikarin Anders Hagberg og tvímansbólkurin »Tonemakeriet« úr Noregi, sum eisini var og vitjaði í fjør.

Millum føroysku luttakararnar eru »Shalder Geo«, »Enekk«, Niels Midjord, nýggi spælimansbólkurin »Gigl« og ein uppaftur nýggjari bólkur uttan heiti. Rokkbólkurin »Click Haze« verður við á eini uttandurakonsert, sum verður í Gøtu mánakvøldið 10. juli.

### Utla

Bólkurin »Utla« er ein rættiliga sermerktur free-jazz-fólkatónleikabólkur, har ljóðførini, ið nýtt verða, eru saxofon, harding-fiól og alskins slagljóðføri. Teir, ið manna bólkin, eru Håkon Høgemo, Terje Isungset og Karl Seglem, ið allir eru úrmælingar á ljóðførum sínum. Bólkurin hevur ferðast um alt Europa, í USA, Canada og Japan og givið 4 fløgur út við sínum egnu kompositiónum og tilrættisleggingum av siðbundnum norskum tónleiki.

### Dandala

Hetta er ein bólkur við trimum trummuleikarum, einum saxofon-leikara, einum bass-leikara, einum korahørpuleikara og fýra sangarum. Tað er Basiru Suso, ið syngur solo og spælir á vesturafrikanska streingjaljóðførið kora. Bólkurin spælir egnar sangir og tilrættisleggingar av siðbundnum sangum og instrumentalum løgum úr Gambia, haðani fimm av teimum seks monnunum eru ættaðir.

Malick Jagne, ið var í Føroyum í fjør og spældi saman við føroyska bólkinum »Click Haze«, er ein av trummarunum í bólkinum og fer – eins og í fjør – at undirvísa á einum trummuskeiði, ið hesaferð verður á Háskúlanum í Havn, týskvøldið 11. juli. Áhugað kunnu tekna seg longu nú hjá Jón Tyril, tlf. 441653 ella 442115.

### Anders Hagberg

Anders Hagberg úr Svøríki er ein ógvuliga royndur tvørfloytuleikari við beinunum í mongum ymiskum tónleikasløgum, heimatónlist, jazzi, poppi o.ø. Er í løtuni ein av limunum í heimskenda svenska/indiska heimstónlistabólkinum »Mynta«, sum higartil hevur givið tvær fløgur út, og hevur fleiri ferðir verið í Føroyum sum limur í norðurlendska »Yggdrasil«, sum er ein jazz-bólkur við »heimstaði« her á klettunum.

### Tonamakeriet ella Kjekk Norsk Ungdom

Hetta eru Audun Austli, ið spælir kassagittar, og Kyrre E. Slind, ið spælir indiskan sitar. Teir spæla egið tilfar, og vóru við á stevnuni í fjør.

Umframt konsertirnar, sum í ár verða í Havn, bæði innan- og uttandura, í Gøtu, í Skálavík, umborð á »Smyrli« á veg til Tvøroyrar og í Klubbanum á Tvøroyri, verður skipað fyri einum barnatiltaki í Listaskálanum, har Sharon Weiss fer at undirvísa í ymiskum fólkadansum, og hjá teimum við áhuga í afrikanskum trummuspæli verður skipað fyri einum skeiði í hesum á Háskúlanum í Havn, sum lýst omanfyri.

Føroya Fólkatónleikarfelag skipaði nú í vetur fyri eini work-shop við støði í Nótabókini hjá Svabo frá 1775, og nakað av tí, ið kom burtur úr verður at hoyra á eini uttandurakonsert í Grasagarði í Havn leygardagin 15. juli. Sunnudagin 16. juli verður, triðja árið á rað, kingo-konsert í Havnar kirkju.

Fólkatónleikarstevnan í ár verður í ár fyriskipað av Føroya Fólkatónleikarfelag í samstarvi við Norðurlandahúsið og Tónleikasamtakið Grót.